## Fyrsti heimasigurin til Blackpool

Enska felagið Blackpool, har Claus Bech Jørgensen er ein av spælarunum, vann leygardagin sín fyrsta dyst á heimavølli í hesum kappingarárinum. Blackpool hevði vitjan av Leyton Orient, og Blackpool vann 3-0. Blackpool hevur spælt 12 dystir og hevur nú 11 stig. Liðið liggur í botninum í triðbestu deildini, men fekk betur samband við liðini omanfyri eftir sigurin leygardagin. Blackpool er nummar 21 av 25 liðum í League One.

## FCK jagstrar Rommedahl

Sambært enska blaðnum Sunday Mirror er danska felagið FC Keypmannahavn áhugað í at keypa vongspælaran Dennis Rommedahl frá Charlton. Rommedahl spældi á sinni í Lyngby, har hann var liðfelagi hjá Toda Jónsson, men hann hevur seinnu árini spælt fyri PSV Eindhoven og Charlton. Nú verður roknað við, at Rommedahl kann verða seldur, og bæði PSV og FCK skulu verða áhuga í skjóta danska spælaranum, sum spældi sín fyrsta landsdyst fyri Danmark ímóti Føroyum á Tórsvølli.

# Nú stendur á jøvnum

**Kinverska formil 1 koyringin gjørdist somikið spennandi, at tað tyktist ikki sørt hóskandi, at koyringin endaði við at støðan í HM er fullkomiliga jøvn og sera spennandi.**

FORMIL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Kappingin millum Schumacher og Alonso er nú sera jøvn og spennandi*

Michael Schumacher koyrdi fyrstu um málstrikuna í kinversku formil 1 koyringini, beint í hølunum á honum var Fernando Alonso, og eru teir tí heilt javnir í kappingini um HM við 116 stigum hvør. Við Renault liðfelaganum hjá Alonso á triðja plássi kom Renault aftur framvið Ferrari í kappingini um HM fyri lið, men við 179 stigum móti 178 stigum til Ferrari er eisini tætt í hesari kapping.

Kinverska formil 1 koyringin byrjaði í regni, og Alonso koyrdi skjótt eitt stórt glopp niður til liðfelagan Fisichella, ið lá sum bremsa millum Alonso, Honda bilarnar, Kimi Räikkönen og Michael Schumacher. Michelin dekkini vóru nógv sterkari fyrstu løtuna.

Við 13 umførum koyrdum var gloppið millum Alonso og Schumacher á 6. plássi 25 sekund.

Men tá var blivið somikið turt, at Bridgestone dekkini gjørdust betru dekkini, og ein fyri og annan eftir koyrdi Schumacher framvið kappingarneytunum. Fyri Alonso gjørdist løtan millum fyrsta og annað pittsteðg heilt galin, við skeivum vali av dekkum rapplaði Alonso aftur eftir, men kom síðan fyri seg eftir annan pittsteðg, og endaði uppi á øðrum plássi.

Henda koyringin vísti í størri mun enn nakrantíð áður hvussu stóran týdning dekkini hava í nútímans formil 1. Einans ein av 12 teimum fremstu bilunum í tíðarkoyringini hevði Brigdestone dekk, tað var Michael Schumacher á 6. plássi. Í nógva regninum leygardagin var Michelin nógv betra dekkmerkið. Tað sama var galdandi í byrjanini av koyringini, men í hálvturra veðrinum vóru Bridgestone dekkini tey betru.

Alla koyringina vóru tættir nærdystir og nógvar yvirhálingar, stutt sagt var koyringin ómetaliga spennandi. Í allar seinasta svinginum, gjørdist dekan ov spennandi. Christian Albers og Takuma Sato høvdu ov nógv um at vera við sínum innanhýsis dysti, og endaðu við at forða Nick Heidfeld á fjórða plássi, ið roydni at koma framvið teimum enn eitt umfar. Teir forðaðu somikið illa, at báðir Honda bilarnir sluppu framvið Heidfeld, og í ruðuleikanum varð hann árendur av Rubens Barrichello.

Eftir koyringina varð Takuma Sato diskvalifiseraður fyri hendingina, og Christian Albers fekk 25 sekund løgd afturat síni tíð.

### Úrslitið í Kina

| | | |
|---|---|---|
| 1 Michael Schumacher - Ferrari | | 10 stig |
| 2 Fernando Alonso - Renault | +3.1 sekund | 8 stig |
| 3 Giancarlo Fisichella - Renault | +44.1 sekund | 6 stig |
| 4 Jenson Button – Honda | +72.0 sekund | 5 stig |
| 5 Pedro de la Rosa - McLaren-Mercedes | +77.1 sekund | 4 stig |
| 6 Rubens Barrichello - Honda | +79.1 sekund | 3 stig |
| 7 Nick Heidfeld Sauber - BMW | +91.9 sekund | 2 stig |
| 8 Mark Webber Williams - Cosworth | + sekund | 1 stig |
| 9 David Coulthard - RBR-Ferrari | + sekund | |
| 10 Vitantonio Liuzzi - STR-Cosworth | +1 umfar | |
| 11 Nico Rosberg - Williams-Cosworth | +1 umfar | |
| 12 Robert Doornbos - RBR-Ferrari | +1 umfar | |
| 13 Robert Kubica - Sauber-BMW | +1 umfar | |
| 14 Takuma Sato - Super Aguri-Honda | +1 umfar | |
| 15 Scott Speed - STR-Cosworth | +1 umfar | |
| 16 Christijan Albers - MF1-Toyota | +3 umfar | |
| 17 Sakon Yamamoto - Super Aguri-Honda | +4 umfør | |
| Givin Ralf Schumacher - Toyota | +7 umfør | |
| Givin Felipe Massa - Ferrari | +12 umfør | |
| Givin Jarno Trulli - Toyota | +18 umfør | |
| Givin Tiago Monteiro - MF1-Toyota | +19 umfør | |
| Givin Kimi Räikkönen - McLaren-Mercedes | +38 umfør | |

EB/Streymur-GÍ 2-3 (1-2):

# Spenningurin á M

*EB/Streymur*

*GÍ*

**Týskarar tosa enn um 3-2 málið hjá Geoff Hurst í HM-finaluni í 1966. Og tað kann væl vera, at EB/Streymafólk um 40 ár eisini tosa um málið, sum Sámal Joensen skoraði á Eiði. Eitt mál, sum átti sín stóra leiklut í, at EB/Streymur spældi sær av við fyrsta trumfin í gullstríðnum**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kykmyndirnar á portalinum kunnu illa staðfesta, hvørt hjálpardómarin hevði rætt ella ikki, tá hann veittraði. Ivasamt man vera, hvørt myndirnar á 3-2 hjá Sjónvarpinum í kvøld hava betri yvirlit yvir hendingina, sum eftir øllum sólarmerkjum at døma verður tann, sum fer at fáa mestu umrøðuna eftir dysin á Eiði sunnudagin. Ein dystur, har EB/Streymur fyri fyrstu ferð í ár tapti á heimavølli. Og ein dystur, sum av álvara læt upp fyri spenninginum í FM-stríðnum, har HB nú bara er tvey stig aftan fyri oddaliðið.

### Kjakevnið

Dysturin á Eiði var merktur av nógva vindinum. Fyrra umfarið høvdu gøtumenn hendan undan, og tað var eisini skjótt, at teir gjørdu sær dælt av hesum. Alt fyri eitt royndu teir at trýsta bóltin niðan móti heimamálinum, og eftir bara sjey minuttum var hol komið á. Sámal Joensen royndi seg við skoti, sum Rene Tórgarð ikki átti at havt teir stóru trupulleikarnar av. Bólturin bar tó við ein spælara á vegnum, og so klossaði Rene, tá kósin varð broytt eitt vet. Sjálvir mundi málverjin tó halda, at hann hevði tamarhald á støðuni, men linjuverjin veittraði, og so stóð 0-1 á talvuni. Eitt mál, sum teir í EB/Streymi vóru sera ónøgdir um. Og sum helst fer at verða kjakevni í drúgva tíð.

### Treiskaðust í mótgongdini

Við eini strævnari dystarskrá í beinunum, var hetta alt annað enn tað, sum EB/Streymur hevði tørv á, og eftir lítlari løtu var mótbrekkan enn brattari. Enn tá eftir mest sum ófyrigeviligt verjuspæl.

Upptaktin til málið var horna, sum GÍ fekk ruddað burtur, men so gekk skjótt hinvegin. Ronnie Samuelsen helt ivaleyst, at Rafal hevði tamarhald á støðuni, men pólverjin heilkiksaði, tá hann skuldi stúta burtur. Og uttan neyðuga uppbakningin tapti Rafal nærdystin við Sverra Jacobsen, sum hesa ferð byrjaði í GÍ-álopinum. Og unglingin var ískaldur, tá hann gjørdist einsamallur við René Tórgarð.

At tað eftir hetta yvir høvur eydnaðist EB/Streymi at skapa spenning um útfallið, kemst helst einamest av treiskninum, sum býr í einum oddaliði. Teir noktaðu at geva seg, og teir fingu eisini løn fyri stríðið, tá teir sera vakurt minkaðu til 1-2. Ronnie spældi yngra beiggjan væl í dýpdina, og so kundi Hans Pauli seta ein mann av,



*Sámal Joensen sýndi enn einaferð stórspæl hjá GÍ. Hesa ferð sum bindingarliður millum miðvøll og álop*
Mynd: Sofus D. Johannesen

áðrenn hann sendi í høvdið á Sorin Anghel.

### Einki juice eftir

Málið gav oddaliðnum neyðugu trúnna, og í løtunum kring steðgin hevði liðið helst sína bestu løtu í dystinum. Hóast mótvindin megnaðu teir at leggja eitt ávíst trýst á GÍ málið seinasta korterið fyri steðgin, og tí varð lagt upp til einvíst trýst eftir steðgin.

Fyrstu løtuna tóktist eisini, sum skuldi hetta verða so. Men so líðandi fekk GÍ tó alt betri tamarhald á støðuni. Kanska fyrst og fremst, tí gestirnir alla tíðina royndu at spæla seg úr trýstinum, og tí kravdu eitt størri renniarbeiði frá vertunum, um trýstið skuldi haldast. Og tað renniarbeiðið megnaði EB/Streymur illa at fremja. Snøgt sagt, so var ikki meira juice eftir í motorinum eftir strævnu skránna, og sum tíðin gekk, gjørdust kontra-